# Avmarkaður áhugi fyri fundinum

*Fólkatingslimirnir vóru í minniluta og fjølmiðlarnir í meirluta, tá landsstýrið kallaði til kunningarfund í fólkatinginum um ynski føroyinga um føroyskt fullveldi. Bara tíggju fólkatingslimir høvdu leitað sær í salin og spyrjihugurin var ikki tann stóri*



*Tíggju fólkatingslimir og 25 tíðindafólk ymsastaðni frá møttu tá landsstýrið kallaði til kunningarfund á Christiansborg. Endamálið við fundinum var at kunna donsku tinglimirnar og útlendsku fjølmiðlarnar um ætlan sína at fáa føroyingum fullveldi. Á myndini síggja vit Aage Frandsen, Bendt Bendtsen og Óla Breckmann. Hin føroyski fólkatingslimurin, Jóannes Eidesgaard var eisin á fundinum*

**Mynd: Per Højgaard**

Sveinur Tróndarson

Føroyar vóru í brennideplinum í Fólkatinginum mikudagin. Landsstýrið hevði kallað danskar tinglimir og danskar fjølmiðlar til ein kunningarfund, har tey trý, Anfinn Kallsberg, løgmaður, Høgni Hoydal, landsstýrismaður og Helena Dam á Neystabø greiddu frá ætlan landsstýrisins.

Kunningarfundur landsstýrisins var lagdur dagin fyri at forsætisráðharrin skuldi svarað fyrispurningi í fólkatinginum um samráðingarnar millum Føroyar og Danmark, men hóast tað, má staðfestast, at áhugin millum fólkatingslimir var meira so sum so.

### Søgan má ikki endurtaka seg

Løgmaður hevur fyrr greitt føroyskum fjølmiðlum frá, at hann ber ótta fyri, at søgan, tá føroyingar í 1946 vóru til samráðingar, fer at endurtaka seg. Hann sær ein vanda fyri sær, har fólkatingið fer at binda stjórnina til at leggja eitt alternativt uppskot fyri landsstýrið, sum eisini skal atkvøðast um, til eina fólkaatkvøðu og hesum ávaraði hann danir ímóti.

– Hetta má fyri alt í verðini ikki henda, segði løgmaður.

Løgmaður var sum sagt ikki einsamallur um uppgávuna, tí saman við honum vóru eisini Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal greiddi frá, at landsstýrið er gingið frá sínum upprunaligu ætlanum um at fáa eina skiftiskipan, sum er tengd at búskaparvøkstrinum í samfelagnum og fer á næsta fundi at leggja seg nærri at eini fastari loysn, sum inniber, at blokkurin minkar við fastari upphædd í eitt ávíst áramál.

– Men, segði Høgni Hoydal, – her er talan um eitt samráðingarupplegg og ikki eitt føroyskt krav.

Í sínum innleggi greiddi Helena Dam á Neystabø frá hvat ætlanir landsstýrisins innibera.

Talan er um ein nýggjan felagsskap og Helena greiddi gestunum frá, hvussu landsstýrið kundi hugsað sær, at hesin felagsskapur kemur at síggja út.

### Lítil hugur at spyrja

Sum nevnt frammanfyri, var hugurin at spyrja sera lítil.

Onkrir spurningar vóru kortini. Aage Frandsen vildi fegin hava at vita, um føroyingar væntaðu sær eitt búskaparligt trygdarnet, fyri at forða fyri stórskaða um føroyski búskapurin kollsiglir.

Til tað svaraði Høgni Hoydal, at tað ætlar landsstýrið ikki.

– Føroyingar skulu reka ein ábyrgdarfullan politikk og tá hevði tað verið til lítlan nyttu, um føroyingar altíð kundu farið til Danmarkar eftir pengum, greiddi Høgni Hoydal frá.

Vibeske Peschardt, frá teimum radikalu, spurdi løgmann um landsstýrið hevði mandat til at fara til Danmarkar at samráðast um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Til hetta svaraði løgmaður, at samtyktin í løgtinginum um at landsstýrið skal fara undir samráðingar er greið.

– Vit hava gjørt okkara heimaarbeiði og 19 av 32 tinglimum hava atkvøtt fyri, at vit fara at samráðast, segði hann.

Løgmaður undraðist annars á, at Vibeke Peschardt setti spurnartekin við rættin hjá landsstýrinum at samráðast. Tað er ein rættur, sum landsstýrið hevur, meðan tað er fólkið, sum avgerð, um sáttmálin verður góðkendur.

### Andstøðan í øðini

Tað var frammanundan alment kent, at føroyska andstøðan var ímóti kunningarfundinum og tað var hon eisini aftaná at hann hevði verið.

Edmund Joensen, sum eisini var í Danmark segði við føroysku tíðindastovuna á Christiansborg, at hann heldur fast við, at mannagongdin hjá landsstýrinum er skeiv.

– Hetta er brot á siðvenjuna, at landsstýrið skipar fyri politiskum fundum á Christiansborg. Tað eigur løgtingið at gera, segði Edmund.

Jóannes Eidesgaard vendi sær móti búskaparliga partinum av kunningini, tí hann heldur, at landsstýrið arbeiðir uttan at kunna uttanlandsnevndina.

– Nú tosað teir um eina búskaparliga skiftisskipan upp á í mesta lagið 15 ár, og tað er Uttanlandsnevndin ikki kunnað um, segði Jóannes Eidesgaard við Útvarp Føroya eftir fundin.

### Føroyingar slaka

Endamálið við fundinum var eisini at greiða donskum fjølmiðlum frá uppleggi landsstýrisins. Sum fólkatingslimirnir skuldu fjølmiðlarnir eisini fáa at vita, at sáttmálauppskotið var ikki eitt krav, men eitt samráðingaruppskot, sum enn bara er lagt fram.

Kortini hevur landsstýrið broytt búskaparliga partin av uppskotinum og tað var tann parturin, sum sást aftur í eitt nú Jyllandspostinum í gjár.

Undir yvirskriftini »Føroyingar slaka í fíggjarligu krøvunum« stendur at lesa, at dagin fyri viðgerðini í fólkatinginum slaka føroyingar í búskaparligu krøvum sínum í sambandi við ynski um fullveldi.

– Tað er ikki meiriluti fyri uppskotinum um at skerja blokkin við eini helvt og síðani avvikla restina yvir eitt óásett tíðarskeið og tí er landsstýrið farið frá tí uppskotinum til eitt, sum ásetur fastari karmar um avviklingina av danska stuðulinum, endurgevur greinskrivarin Høgna Hoydal.

Greinskrivarin dylir ikki fyri, at kunningarfundurin eftir hansara tykki er ikki er serliga væleydnaður tí bara tíggju tinglimir møttu og av floksleiðarunum var bara tann eini og tað var partamaðurin hjá Anfinni í Danmark, Bendt Bendtsen.



*Føroyar vóru í brennideplinum á Christiansborg bæði í gjár og fyrradagin. Landsstýrið skipaði fyri kunningarfundi mikudagin og í gjár svaraði forsætisráðharrin fyrispurningi um samráðingartilgongdina millum Føroyar og Danmark*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



# Bankin bíðar

*Føroya Banki, sum fíggjar umleið 70% av føroysku alivinnuni, fer sjálvandi at fylgja væl við tí, sum nú hendir í Fuglafirði. Men enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvørt hetta fer at fáa nakrar fíggjarliga avleiðingar fyri alarar og banka*

Edvard Joensen

Føroya Banki ávarðar í móti at loypa fram av og gera nakað, sum ikki er nóg væl umhugsað, nú ILA sjúkan er staðfest í føroyskari alivinnu. Men tað er greitt, at hetta fer at ávirka støðutakan og framferð bankans í framtíðini. Tað verður neyðugt at kalkulera við, at smittan eisini finst aðrastaðni enn í Fuglafirði, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Føroya Banki merkir ikki so nógv til laksasjúkuna í Fuglafirði í fyrsta umfari, sigur Janus Petersen, bankastjóri. Bæði Vestlax, sum eigur alribrúkið, sum nú er rakt av ILA sjúkuni, og Føroya Banki, sum fíggjar, eru so mikið væl fyri fíggjarliga, at hetta fara báðir partar at klára, sigur hann.

Føroya Banki fíggjar umleið 70% av føroysku alivinnuni. Og tað er greitt, at tað verður fylgt væl við, hvat hendir í vinnuni. Men bankaleiðslan hevur avgjørt ikki mist svøvnin, orsakað av tí, sum hent er á Alilaks í Fuglafirði.

Tað er greitt, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, at tað verður ein fíggjarligur missur fyri alaran, at fiskurin doyr ella verður dripin fyri tíð. Men talan er um felag, sum er væl fyri fíggjarliga, sigur hann, so tað fer at bera til at koma víðari. Føroya Banki fer einki at merkja til júst hetta málið. Her koma trygging og tann serligi grunnurin, sum er til at taka sær av júst slíkum málum, inn í myndina.

Men tað er greitt, at Føroya Banki, saman við alarunum, fer at fylgja væl við gongdin, sigur stjórin í bankanum. Hóast tað vísir seg, at hetta - sum øll vóna - er eitt einsamalt dømi, ber als ikki til at slaka við trygdini hjá alibrúkunum. Nú verða kanningar gjørdar av øðrum alibrúkum til tess at finna út av, um smittan eisini finst aðrastaðni. Tann møguleikin er avgjørt til staðar, tí talan er um sjúku, sum hevur eina ávísa ígerðartíð. So smittan kann saktans vera borin víða, uttan at vit vita tað.

Hendir tað, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, at smittan hevur breitt seg víða í føroysku alivinnuni, so verður støðan sjálvandi ein onnur.

Men hann vísir á, at føroyska alivinnan í løtuni er so mikið væl fyri fíggjarliga, at hon eigur at klára okkurt vambarkastið, áðrenn hon fer um rygg.

Vit hava í dag størri eindir við betri fíggjarstøðu, enn vit høvdu fyri bara nøkrum árum síðan. Tað hevur sjálvandi tann fyrimun, sigur Janus Petersen, at feløgini eru betri fyri fíggjarliga. Men tað hevur eisini tann vansan við sær, at brúkini verða størri, og tí kann sjúkan raka enn meinari, har hon verður staðfest.

Royndirnar siga okkum, sigur Janus Petersen, bankastjóri, at vanliga verður ov lítið gjørt, áðrenn tann fyrsta vanlukkan rakar. Og fyrsta tíðin eftir, at til dømis smitta er komin í alivinnuna, er ofta tann ringasta. Men tað ber til at liva við hesi smittuni í alingini, sigur Janus Petersen og vísir á, at til dømis norðmenn leingi hava havt smittuna. Hann heldur ikki, at vit beinanvegin eiga at mála hin Skortgráa á veggin, men heldur halda høvdið kalt og fylgja við gongdini.



*Janus Petersen,*
*stjóri í*
*Føroya Banka*
*mælir til,*
*at vit ikki loypa framav,*
*nú laksasjúka*
*er staðfest*
*í føroysku alivinnuni.*
*Hann vísr á,*
*at tað ber til*
*at liva við sjúkuni,*
*men at tað tó lættliga*
*kann gerast*
*ein fíggjarligur smeitur,*
*um vit slaka*
*við trygdini yvirhøvur*

# Hampiligur útróður

*Tað hevur gingið hampiligt við útróðrinum á Norðhavinum í vár. Hóast dagarnir ikki hava verið so nógvir, er úrtøkan til at liva við*

Tað ber til at liva av tí, teir hava fingið í vár, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Chris Jan Michelsen, sum er ein teirra, sum rør út av Eiði við snellu.

Chris Jan Michelsen sigur, at tað hevur einki rok verið soleiðis, men prísurin hevur aftur fyri verið so mikið góður, at tað stendur upp og niður.

Tá Sosialurin tosaði við hann beint fyri deadline í gjár, lógu allir bátarnir á Eiði. Veðrið var heldur ólagaligt, og harður streymur er eisini.

Chris Jan Michelsen sigur, at hann sjálvur hevur verið níggju dagar úti. Átta í mars og ein í apríl. Tá roknar hann ikki mikudagin uppí. Tann dagin var hann norðan fyri og vendi, sigur hann, men tað var so ófantaligt, at tað var ikki roynandi.

Tað hevur ongin rættiligur rokdagur verið norðan fyri í ár, letur Chris Jan at. Men mánadagin kom nakað væl upp á land tilsamans, sigur hann. Onkur bátur fekk upp í eitt tons tann dagin.

Annars sigur hann seg skilja, at tað kanska ikki er líka gott fiskarí hjá teimum eystaru bátunum, sum hjá teimum, sum ganga út av Eiðisflógva.

Suðringarnir ætla at verða á Eiði til páskar. Tað velst sjálvandi um fiskiskapin. Chris Jan Michelsen sigur, at í fjør fóru teir suður aftur flaggdagin.

**ej.**



*Chris Jan Michelsen* *( Mynd: Edvard Joensen)*

